# Apoteksverkið bjóðar út reingerð

## á Staravegi 15 í Tórshavn og í Skoragøtu 2 á Rituvíkarhálsi.

Arbeiðið, at fremja reingerð av skrivstovu-hølum, kantinu/køkshølum, vørugoymslu, og hølum til heilivágsframleiðslu hjá Apoteksverkinum, verður nú boðið út.

Útboðið verður framt sum eitt alment útboð sambært rundskrivi nr. 9000 frá 1. juli 2019 um keyp av vørum og tænastum. Tær formligu reglurnar í hesum útboði viðvíkjandi innlating av tilboði, samskifti í millum útbjóðara og veitara og aðrar upplýsingar eru at finna í hesum útbjóðingarskrivi.

### Hetta útboðið inniheldur í høvuðsheitum fylgjandi stig:

1. Útinnan av tilboði: Veitari fyrireikar sítt tilboð við støði í útboðstilfarinum, og tilboð skal vera latið inn innan ásettu tilboðsfreist. Í hesum tíðarskeiði kann veitari fáa fleiri upplýsingar við at seta skrivligar spurningar, og við at síggja hølini.

2. Meting av tilboðnum: Útbjóðari letur upp og metir um, hvørt innkomin tilboð eru í samsvær við form- og minstukrøv. Eftir hetta verða innkomin tilboð mett í samsvar við ásettu tillutanartreytirnar.

3. Tillutan av sáttmála: Útbjóðari tekur avgerð um tillutan av sáttmála og kunnar veitara um avgerðina.

## Hølini á Staravegi 15

- Hølir til heilivágsframleiðslu. Talan er um samanlagt uml. 600 m²
- Skrivstovuhølir v.m. Talan er um samanlagt uml. 950 m²
- Kantinu, køk/serveringsøkið. Talan er um samanlagt uml. 169 m²

## Hølir á Rituvíkarhálsi

- Durur, matstova, skiftirúm, wc og kontrolrúm. Talan er samanlagt uml. 90 m²

Tekningar av hølunum og nágreinan til reingerð í heilivágframleiðsluni, eru viðheftar í útboðnum. Tey, sum hava áhuga at geva tilboð, vilja vit mæla til, at síggja hølini, ið bjóðast skal uppá. Veitarar kunnu seta seg í samband við Beintu Hilduberg fyri at avtala at síggja stovnin, í samband við at greiða tilboð av hondum.

### Reingerðarætlan

Veitarin skal hava drúgvar royndir við klassifisera reingerðarbeiði og kunna skjalprógva tað. Tann, ið hevur reingerðina um hendi, hevur ábyrdina av, at hølini dagliga eru rein, nosslig, og væl frágingin eftir at reingerðin er framd. Um starvsfólk eru í vegin, skal veitarin takað samband við viðkomandi, so reingerð kann so vítt møguligt, fremjast.

Veitarin veitir vaskiútgerð, og hevur ábyrgd av at halda vaskiútgerð reina. Veitarin skal vaska og turka lappar, viskustykkir og moppir.

Apoteksverkið fylgir almenna útboð hjá landinum fyri nýtsluvørur brúkspappír, sápur, posar v.m.

# Staravegur 15

**Reingerðin fevnir um:** heilivágsframleiðsluhølir, starvsstovu, skamtanaraugreiðsla, skrivstovur, fundarhølir, samrøðuklivar, kantina, køkur/serveringsøkið, gongir, wc, durur, trappa/ trappugongd, lyft, klædnarúm, og vørugoymsla.

## Heilivágsframleiðsluhølir:

**Alment:** Eftir reingerð skulu rúmini verða sjónliga rein og støvfrí, og gólvið skal vera uttan skoynir. Metast skal tí fyri hvørt einkult rúm, um eyka reingerð krevst á útsettum støðum.

Av tí at starvsfólk á Apoteksverkinum sjálvi standa fyri ein part av reingerrðini í heilivágsframleiðsluhølunum, so er ábyrgdarøkini hjá reingerðarveitaranum lýst í viðhefta skjali: Reingerð. Lýsing og mannagongd í kl. C og D.

Reingerðartíttleikin fyri tey ymsu ábyrgdarøkini fylgir eini reingerðarætlan.

Í høvuðsheitum er reingerðin soleiðis hjá reingerðarvirkinum:

- **Dagliga reingerð, 4 dagar um vikuna:** Part av øki samsvarandi eini reingerðarætlan. Er vanliga uml. 300 m², svarandi til uml. 24 rúm. **Reingerð:** Gólv, vaskir og økir, ið vanliga rørt verður við
- **Vikulig reingerð, 1 dag um vikuna:** Alt økið, 600 m², svarandi til 40 rúm. **Reingerð/desinficering** av flatum upp til 1.80 metra hædd: Gólv, vaskir og økir, ið vanliga rørt verður við. Hyllar, vindeygu og skóvar.
- **Kvartálig reingerð:** Alt økið, 600 m², svarandi til 40 rúm. **Reingerð/desinficering** av øllum flatum nevndum í viðhefta fylgiskjali, upp til 1,80 metra hædd, tó ikki sjálvan veggin.
- **Árlig reingerð:** Alt økið, 600 m², svarandi til 40 rúm. **Reingerð/desinficering** av øllum flatum nevndum í viðhefta fylgiskjali, tvs. eisini yvir 1,80 metra hædd.

## Skrivstovuhølir v.m.:

**Dagilg reingerð, 5 ferðir um vikuna:**

- Durur út til Staravegin skal dustsúgvast/ vaskast
- Fundarrúm reingerðast
- Ruskspannir tømast inni á skrivstovum, og pappírsrsekkir tømast eftir tørvi
- Skoynir/plettar á gólvum, flatum og glasveggum og hurðum, turkast burtur dagliga
- Kantinuøkið, verður reingjørt dagliga, herundir gólv verður vaskað, borðini turkaði, og stólar haldast reinir. Køkur og rúmið við síðina av køkinum, serveringsøkið, gólvið verður vaskað dagliga. Veggir inni í serveringsøkinum upp til 1,80 m haldast vikuliga reint.
- WC-rúm verða gjørd rein hvønn dag. Vask, kummur og gólv verða vaskað. WC-setrið/lokið skal takast av kummuni

jaunan og vaskast skal væl ímillum samankomingina á setrinum/lokinum.
Eru slett/plettir á vegginum/hurðini/durastavinum ella fram við vaskinum, har wc-rullan hongur ella aðrastaðni, skal hetta vaskast burtur.
Turkast skal eftir el-kontaktini, handtakinum og durastavinum. Spegl verða turkað. Ansast skal eftir, at hondsápa er fylt og at haldarin til wc-rullur og pappírs-handklæðini eru fyltur.

- Skamtanaravgreiðslan. Gólv, skrivíborð, hillar, flatir, skáp, vindeygakarmar, hurðar, lampur, hondtøk og annað upp til 1.80 m, verður vaska og turkað fyri fingramerkir/dust. Stólar, stólabein, borð, borðbein verða turkaði eftir tørv. Ruskspannir verða tømdar hvønn dag. Somuleiðis skulu sløkt el-framleiðslutól støvast av.

## Reingerð eina ferð um vikuna:

- Skrivstovur og samrøðuklivar verða reingjørd eina ferð um vikuna.
  Gólv vaska/dustsogin. Skrivíborðini, hillar, skáp, vindeygakarmar, hurðar, myndir, lampur, hondtøk og annað upp til 1.80 m, verður turkað fyri fingramerkir og dust. Stólar, stólabein, borð, borðbein inni á skrivstovum verða turkaði. Ruskspannir verða tømdar hvønn dag.
  Tað, ið liggur á skrivíborðum, eigur ikki at verða flutt. Um skrivíborð ikki eru atkomulig, tí nógv arbeiðstilfar liggur á teimum, verða tey ikki gjørd rein. Avtala skal við starus-fólkið, so hesi skrivíborð jaunan gerast rein.
  Skrivíborð, har ongin situr við í eitt tíðarbil, skulu jaunan turkast.
- Allir glasveggir skulu síggja væl turkað út. Fingrar/skoynir/dust mugu ikki síggjast á glasveggum og øðrum flatum
- Vørugoymsla og vøruslúsa verður dustsogin/vaska eina ferð um vikuna.
- Vaskirúm og nærarkiv skulu gólvini vaskast/dustsúgvast vikuliga
- Starusstovan skal skrivaraborðini, vindeygakarmar, skápslúkur upp til borðplátu, reingerðast vikuliga.
- Veggir inni í serveringsøkinum upp til 1,80 m haldast vikuliga reint.
- Reingerð av køliskáp og mikroovn inni í serveringsøkinum

## Reingerð tvær ferðir um vikuna:

- Gólv inni í starusstovuni, gongir, trappa, lyfta og klædnarúm verður dustsogin/vaskað tvær ferð um vikuna, tó oftari í vetrarhálvuni.

## Reingerð eina ferð um mánaðin:

- Øll vindeygu/glas innan verða reingjørd innan
- Innaru glasveggir og glashurðar reingerðast

## Reingerð hvørt kvartal:

- El-talvurúm og skjala goymsla skulu gólvini vaskast kvartárliga

## Reingerð eina ferð um árið:

Apoteksverkið tilskilar sær rættin at biða um tilboð av árligu høvuðsreingerð frá fleiri veitarum, tá tørvur og ynski er á hesum.

# Rituvíkarhálsur

**Reingerðin fevnir um:** Dur, vesir, skiftingarrúm, kontrolrúm og matstovu. Reingerðin fer fram 1 ferð um vikuna.

## Reingerðin umfatar:

- Øll gólvini støvsúgvast/vaskast og haldast rein
- Skrivstovuborð turkast/vaskast
- Hurðahondtøk og øki á hurðini kring hurðahondtøkini turkast/vaskast.
- Turka/vaska borð, frontar og flatur í matarøkinum, soleiðis at tað sær ordiligt út, starvsfólkini syrgja fyri at halda hølið rudduligt.
- Vesini vaskast, gólv vaskast, vask/spegil vaskast, hurðahondtøk sprittast. Veggur á vesinum haldast reinur og vaskast eftir tørvi. Fyllast skal upp við wc pappír, hondsápu og pappír til persónliga nýtslu

## Annað:

- EDV-tól, ið eru tendrað, mugu ikki sløkkjast. EDV-tól so sum skíggjar og knappaborð verða ikki gjørd rein (hetta skulu starvsfólkini sjálvi gera). Telefonir og onnur elektronisk útgerð á skrivstovum skal støvast av/vaskast vikuliga, við hóskandi amboðum.
- Vaskitíðin er mánadag til fríggjadag. Skrivstovuøki skal vaskast í dagtímunum. Heilivágsframleiðsluhølir, goymsla v.m. kann reingerð vera millum kl. 15.00 og 22.00. Vaskitíðin kann, um serligur tørvur er á tí, vera leygar- og sunnudag millum kl. 8.00 og 22.00
- Stovnurin er virkin allar vanligar yrkadagar, tó eru hølir minni í brúk í feriutíð.
- Øll starvsfólk hjá veitaranum skulu undirskriva tagnarlyfti, áðrenn byrja verður. Vaskifólk ella avloysarar mugu ikki taka óviðkomandi fólk við inn í bygningar hjá Apoteksverkinum, meðan vaskað verður.

## Viðgerð av tilboðum

- Tilboðini verða vektað soleiðis:

**Prísur vektar 50%**

Øll reingerðin verður bjóðað út undir einum, tó skal verða tilskilað, hvussu nógv hvørt einstakt vaskistað kostar mánaðarliga. Tilskilað vaskiøkir eru heilivágsframleiðslan, skrivstovuøki v.m., og Rituvíkarhálsur.

**Veiting vektar 50%**
**og verður deild upp soleiðis:**

25% góðskutryggja reingerð. Í hesum liggur týðilig útgreinan og skjalpróvgvan av veitan, og royndum við líkandi góðskutryggja reingerð innan klassifisera serøki og skrivstovuøkir.

Veitarin kunnu eitt nú vísa á, skjalpróvgva góðsku á reingerð, reinførisútbúgving, handfaring av serøkjum, skjalfest sporføri, handfaring av klagum v.m.

25% reingerðartrygd. Í hesum liggur at dagliga reingerðin verður framd hvønn dag, og at veitarin tryggjar avloysarar við sjúku, frítíð o.l.

Veitarar kunnu eitt nú vísa á, hvussu nógv starvsfólk veitarin hevur, sum kunnu traðka til um sjúka ella annað er áfatt. Veitarin kann eitt nú vísa á, við at lýsa hvussu arbeiðið verður skipað í feriutíðum.

- Sáttmálaskeiðið verður 3 ár við møguleika at leingja tvær ferðir 1 ár um semja er um tað. Sáttmálin kann verða uppsagdur av báðum pørtum við 3 mánaðar skrivligari uppsagnartíð tann fyrsta í mánaðnum. Arbeiði byrjar tann fyrsta november 2026 ella eftir nærri avtalu.
- Møguleiki skal vera fyri samráðingum og tillagingum av veitan við tann sum hevur besta tilboðið. Apoteksverkið tilskilar sær rættin ikki at taka av nøkrum tilboðið.

| Freist | Hendingar | Viðmerkingar |
|---|---|---|
| **1. august 2026** | Útbjóðin verður kunngjørd á Keypsportalinum | |
| **Vika 32 og 38 í  2026** | Møguleiki er at avtala tíð at síggja hølini í viku 32 og 38. | Tíð kann bíleggjast hjá Beintu Hilduberg, tlf. 225410 teldupost: beintah@apotek.fo |
| **21. september 2026** | Freist at seta spurningar | Spurningar skulu vera skrivligir og skulu sendast til Beintu Hilduberg, á teldupost beintah@apotek.fo |
| **25. september 2026** | Freist at svara spurningum | |
| **1. oktober 2026** | Freist at lata tilboð in | Freistin at lata inn tilboð er 1. oktober 2026 kl. 16.00. Tilboð, ið verða móttikin eftir freistina, verða ikki viðgjørd. Tilboð skulu sendast við telduposti til Beintu Hilduberg beintah@apotek.fo |
| **15. oktober 2026** | Avgerð tikin | Apoteksverkið skilar sær rætt til at biða veitara koma á fund, áðrenn endalig støða verður tikin. Apoteksverkið skilar sær eisini rætt til ikki at taka av nøkrum av innkomnu tilboðunum. |
| **1. november 2026** | Vinnandi veitarin byrjar at vaska | |